# REGLUGERÐ
## FYRI
## ÚTLEIGAN AV
## EIÐIS SKÚLA
## OG
## ÍTRÓTTARHØLL

**1.**

Venjing í samband við bóltspæl og bóltspæl annars má bert fara fram í ítróttarhøllini og/ella fimleikarhøllini.

Í øllum øðrum hølum er bóltspæl strangliga bannað.

**2.**

Leigarin rindar ta leigu, sum Bygdaráðið til eina og hvørja tíð ásetur.

**3.**

Ítróttarhøllin og/ella høli í skúlanum annars verða leigað út við vanligum hita og tí fasta ljósinum.

Til at seta upp eykaljós krevst loyvi frá umsjónarmanninum.

**4.**

Reingerð er íroknað ásetta leigugjaldið fyri leigu av ítróttarhøllini og fyri leigu av hølum í skúlanum.

Verður neyðugt at verja gólvið í ítróttarhøllini í samband við leigu, ber leigarin útreiðslurnar av at leggja verjuna á og taka hana av aftur.

Verjan verður løgd á eftir leiðbeining frá umsjónarmanninum.

**5.**

Leigarin skipar sjálvur fyri fólki til sølu av atgongu-merkjum.

Leigarin hevur skyldu til at hava neyðug eftirlitsfólk.

Í samband við leigu av ítróttarhøllini til dans, konsertir, o.t. skal leigarin neyvt fylgja teim treytum, sum til eina og hvørja tíð verða ásettar av Føroya Landfúta o.ø. myndugleikum.

Leigarin skipar sjálvur fyri eftirlitið av klædnagoymslu o.t.

Verður neyðugt við løgreglu-, bruna-, náttar- ella aðrari vakt, skipar leigarin sjálvur fyri hesum, og ber somuleiðis út-reiðslurnar, sum standast av hesum.

**6.**

Fyri leigu av ítróttarhøllini og hølum í skúlanum til fastar venjingar v.m. verður leigan at rinda frammanundan til umsjónarmannin.

Fyri leigu av ítróttarhøllini og hølum í skúlanum til kon-sertir, dans o.l. skal umsjónarmaðurin krevja veð ella banka-trygd. Tað er ábyrgdin hjá umsjónarmanninum, at henda treyt verður yvirhildin.

**7.**

Til tiltøk við atgongugjaldi mugu bert atgongumerki hjá ítróttarhøllini nýtast. Atgongumerki, ið ikki verða nýtt, skulu beinanvegin latast aftur til høllina.

Skal avgjald latast av innkomnum atgongupeningi, verður hetta avroknað við umsjónarmannin beinanvegin, tiltakið er

liðugt.

**8.**

Venjingar víkja fyri øðrum tiltøkum.

Ásettar venjingartíðir skulu haldast.

Møtir leigari framhaldandi ikki upp til ásetta venjingartíð, hava umsjónarmaðurin rætt til at leiga ítróttarhøllina og/ella leigaðu hølini í skúlanum til annan leigara.

Leigarin, sum hevur verið frammanundan, skal rinda fyri teir tímar, hann ikki er uppmøttur, um so er, at hetta hevur forða fyri leigu til aðrar.

**9.**

Um so verður, at óvantaðar hendingar koma at forða fyri, at avtalað nýtsla av ítróttarhøllini og/ella øðrum hølum í skúlanum kann fara fram, frítekur hetta Eiðis Skúla og Ítróttarhøll fyri eina og hvørja ábyrgd mótvegis leigaranum.

**10.**

Við leigu av ítróttarhøllini ella ørðum hølum í skúlanum til venjingar ella onnur tiltøk skal upplýsast fyri umsjónarmanninum nøvnini á teimum, sum hava samábyrgd mótvegis Eiðis Skúla og Ítróttarhøll.

**11.**

Verður neyðugt at seta upp og beina burtur stólar, borð, pall o.t. í ítróttarhøllini ella í øðrum hølum í samband við leigu, útvegar leigarin sjálvur fólk til hetta og ber annars sjálvur útreiðslurnar, sum standast av hesum.

Uppsetingin verður at gera eftir leiðbeining frá umsjónarmanninum.

**12.**

Til pappír o.a. burturkast eru uppsett íløt, sum skulu nýtast.

Tað er ikki loyvt at hava pylsur o.t., glasfløskur, gløs o.o. íløt úr glasi annars við inn í skúlan og ítróttarhøllina.

**13.**

Tað er ikki loyvt, meðan dystir eru, ella gestir annars eru til staðar, at uppihalda seg í forhøllini í spælibúna.

Taskur, yvirklæði og útbúnaður annars mugu ikki liggja og sløðast í ítróttarhøllini og/ella leigaðu hølunum.

**14.**

Fyri pengar, klæði og virðislutir annars átekur Eiðis Skúli og Ítróttarhøll sær onga ábyrgd.

Ørindaleys hava onga atgongd til skiftingarrúmini.

**15.**

Til venjing ella dystir í ítróttarhøllini er strangliga bannað at nýta fótbúnað, sum hevur verið nýttur uttandura.

Tað er somuleiðis strangliga bannað at nýta fótbúnað við ribbum, knøttum ella fótbúnað, sum hevur sóla úr svørtum syntetiskum gummi.

**16.**

Royking er strangliga bannað innandura í skúlanum og ítróttarhøllini.

**17.**

Rúsandi drykkir mugu ikki nýtast, ei heldur finnast í ítróttarhøllini og/ella leigaðum hølum í skúlanum.

Í samband við serlig tiltøk kann tó loyvast at nýta rúsandi drykkir í ítróttarhøllini.

**18.**

Leigarin hevur ábyrgdina av, at ítróttarfólk og leiðarar halda tær ásettu reglurnar.

**19.**

Sølulýsingar eru ikki loyvdar uttan so, at Bygdaráðið frammanundan skrivliga hevur játtað hesum - undantikið eru tó sølulýsingar á leikbúnum.

Bygdaráðið kann heimilað umsjónarmanninum at taka støðu til sølulýsingar.

**20.**

Allir leigarar, tað veri seg feløg við limum og viðhaldsfólk teirra, skulu til eina og hvørja tíð rætta seg eftir ávísingum frá umsjónarmanninum ella hjálparfólki hansara.

Verða ávísingarnar ikki fylgdar, hevur umsjónarmaðurin rætt til, uttan ávaring at nokta feløgum eins væl og einstaklingum atgongd til ítróttarhøllina og/ella til onnur høli í skúlanum.

**21.**

Máling í samband við framsýningar er strangliga bannað.

**22.**

Einki má verða hongt upp ella sett fast í ítróttarhøllini og/ella leigaðum hølum í skúlanum, uttan at loyvi er fingið frá umsjónarmanninum í hvørjum einstøkum føri.

**23.**

Leigarin er endurgjaldsskyldugur fyri tað, sum av hansara ávum misferst í ella uttan um ítróttarhøllina ella skúlan eins og fyri skaða, sum hendir í leigutíðini.

**24.**

Teir leigarar, leikarar ella áskoðarar/áhoyrarar, sum ikki fylgja hesi reglugerð ella á ein ella annan hátt gera seg inn á ítróttarhøllina ella høli í skúlanum, verða burturvístir.

**25.**

Henda reglugerð er galdandi til Bygdaráðið ásetur annað.

**Soleiðis samtykt á bygdaráðsfundi 07.04.03**

*Tordur J. Niclasen*
*borgarstjóri.*